# Fundarfrágreiðing

Ár 2016, tann 07. apríl, varð ársaðalfundur hildin í P/f Norðoyartunnilin . Fundurin varð hildin á Hotel Hafnia og byrjaði kl. 11.30.

Fundarluttakarar:

Partaeigarin var umboðaður av Kaj Johannesen, fulltrúa í Samferðslumálaráðnum, sum nú hevði umsitingina av samferðslukervinum um hendi, herundir undirsjóvartunlum. Kaj upplýsti, at hann í dagliga yrki sínum fekst við hesa umsiting og hevði starvsfulltrú at møta vegna partaeigaran. Øll nevndin var á fundi, og eisini stjórin Uni Danielsen, umframt Reinhold Isaksen. Óla Jákup Kristoffersen, adv. var eisini á fundi.

1. Nevndarformaðurin Jens Kári Vilhelm ynskti vælkomin og skeyt upp at velja Óla Jákup Kristoffersen, adv. sum fundarstjóra. Hann varð valdur. Fundarstjórin staðfesti, at fundurin lógliga var innkallaður, og lýsti soleiðis fundin sum lógliga settan.

2. Stjórin Uni Danielsen greiddi vegna nevndina frá virki felagsins í farna ári, herundir eisini kunning sambært § 18. Hann greiddi millum annað frá um fíggingina av tunlinum, og at skuldin pr. ultimo 2015 var uppá kr. 26,2 mió. kr. Trekningsrætturin var uppá kr. 52,2 mió. kr. orsakað av avlopslikviditeti. Greitt var frá ferðslutølum, eitt nú miðalferðslu pr. døgn í 2015 uppá 2.463 akfør, sum var íalt 899.800 akfør alt árið. Ymisk hagtøl, grafar o.s.fr. varð víst og greitt frá. Rakstraræltlanin fyri 2016 vísti ein umsetning uppá 23,5 mió. kr., úrslit 5,1 mió. kr. og likviditetsavlop 2,9 mió. kr. Ætlanin varð gjørd í november 2015, og síðani tá er prísurin lækkaður.

Spurningar og viðmerkingar vórðu gjørdar undir frágreiðingini, og síðani varð frágreiðingin tikin til eftirtektar.

3. Stjórin Uni Danielsen gjøgnumgekk roknskapin.

Aftaná gjøgnumgongdina setti Kaj Johannesen sama spurning sum á undanfarna aðalfundinum, "hvat scrap-virðið av tunlum og vegum var". Formaðurin og stjórin svaraðu á sama hátt, at hetta svaraði til, tá avskrivað varð niður til partapeningin.

Roknskapurin varð síðani góðkendur.

4. Ársavlop varð flutt til næsta ár.

5. Nevndin varð afturvald.

6. Val av grannskoðara.

Víst verður til frágreiðingina á undanfarna aðalfundinum í P/f Vágatunlinum og at sami grannskoðari átti at grannskoða bæði feløgini. NUMO varð tí valt til nýggjan grannskoðara. Sí citat niðanfyri úr fundarfrágreiðingini hjá P/f Vágatunnilin.

"Formaðurin Jens Kári Vilhelm vísti til aðalfundin í fjør, tá landsstýrismaðurin ynskti, at grannskoðarauppgávan varð boðin út. Felagið hevði tí bjóðað grannskoðarauppgávuna út til 4 virkir, grundað á nakrar ávísar útboðstreytir. Bíligast var NUMO, løggilt grannskoðanarvirki Sp/f við einum boði kr. 24.000,00 fyri eitt ár. NUMO hevði í sínum boði ásett nakrar fortreytir. Eftir samskifti millum

NUMO og felagið, hevði NUMO strikað allar fortreytir, so at innkomin boð vóru samanlíknilig. Nevndin mælti til at taka av bíligasta boðnum, og tað tók partaeigarin undir við. Numo, løggilt grannskoðanarvirki varð tí valt til nýggjan grannskoðara ístaðin fyri P/f Januar, løggilt grannskoðanarvirki."

7. Innkomin uppskot og ymiskt.

Ongi uppskot vóru innkomin og heldur onki varð umrøtt undir ymiskt.

Til endans takkaði formaðurin Jens Kári Vilhelm fyri tað álit, sum var víst nevndini við at afturvelja nevndina.

Fundurin lokin.

Sum fundarstjóri:

Óla Jákup Kristoffersen, adv.